## DAGSINS MEINING

# Skilagott heilsuprát

Sjónvarpið hevur nú nakrar ferðir havt sendingina “Gesturin” á skránni. Ein sera áhugaverd sendirøð, ið hyggjararnir uttan iva eru glaðir um. Sendingin seinasta mánakvøld var einki undantak í so máta. Samrøðan við landslæknan var bæði viðkomandi og áhugaverd fyri ikki at siga lívgevandi. Her møttu vit einum siðiligum og vælgrundaðum landlækna, ið heldur enn at tala niður til fólkið tosaði við fólkið og um fólkið.

Evnið heilsa, sjúka og tað, sum hevur tilknýti til hetta stóra málið, er ikki altíð so lætt at umrøða. Oftani verða slíkir “heilsuserfrøðingar” mettir sjálvklókir og dømandi, og tí eru tað eisini tey, sum skrúva fyri. Tey orka ikki at hoyra allar hesar formaningarnar og moralprædikkurnar, at tey rætt og slætt kobla av. Tað er sum við alkoholikkaranum og stórroykjaranum, ið ikki tíma at hoyra um sína lagnu og sínar skeivu og vandafullu vanar. Tí er tí av stórum týdningi, at tey, sum arbeiða við heilsuspurningum samskifta ódømandi og siðiliga-diplomatiskt. Tí tað mest umráðandi er jú at fáa heilsuboðskapin út – at fáa fólk at lurta. Eitt er at fáa fólki at broyta ringar vanar, annað er at fyribyrgja, at fólk taka til sín ringar vanar. Uppgávan er at fáa fólk at taka boðskapin til sín – ein boðskapur, sum jú snýr seg um at fáa fólk at verða góð við seg sjálvan og síni.

Landslæknin hevði nøkur skilagóð og vælmeint orð at bera føroyingum. Bert við at leggja sær sjálvum nakrar góðar vanar ella leggja nakrar óvanar av, so ber til at liva væl og leingi. Við at røra seg og og eta og drekka sunt, kann ein fyribyrgja nógvum álvarsligum sjúkum. Bara tað at ganga ein hálvan tíma um dagin – so einfalt kann tað gerast - kann vera heilsu- og sálarbót fyri hvønn av okkum. Tað einasta hetta krevur av okkum er, at vit sjálvi taka okkum í nakkan og seta nakrar góðar og sunnar vanar út í kortið.

Landslæknin kom eisini inn á spurningin um at brúka príspolitikk til at ávirka heilsustøðuna hjá fólki td. at leggja hægri prísir á ósunnar og “heilsu-skaðiligar” vørur. Hetta er eisini ein sera áhuga-verdur spurningur, sum átti at verið tikin upp í tí uppfylgjandi orðaskiftinum. Reyði tráðurin í samrøðuni var, hvussu vit fáa tað fyribyrgjandi arbeiðið at virka betur. Fyribyrging er lykaorðið. So er bara spurningurin, hvussu hetta verður fylgt upp.Tað er stóri trupulleikin í øllum lívsins viðurskiftum. Og her hava fjølmiðlarnir so sanniliga eina ábyrgd. Vit vilja tí mæla fólki, sum arbeiða við heilsuspurningum og her ikki minst fyribyrgjandi arbeiði um at brúka fjølmiðlarnar. Okkara miðil vil í hvussu er eftir førimuni royna at liva upp til hesa avbjóðing.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ósannur og óseriøsur

**Jóannes Eidesgaard**
*fólkatingsmaður*



Tað var nú spell, at formaður tjóðveldisfloksins, sum alment fekk høvið at seta hol á valstríðið til fólkatingsvalið í gjár, ikki legði seg á eitt hægri støðið, enn hann gjørdi. Í staðin fyri eina sakliga og fríska byrjan, so hevði Høgni Hoydal ikki annan boðskap at halla seg til enn ósannindir og so henda afturvendandi óseriøsa háttin at venda viðurskiftini á høvdið.

Lat meg fyrst siga, at eg als ikki var serliga spentur at frætta frá eykaflokstingi tjóðveldisfloskins, har spurningurin, um teir fóru at stilla upp ella ikki, skuldi viðgerast. Tjóðveldisflokkurin er jú vorðin ein sera trúgvur kandidatur, tá tað snýr seg um Fólkatingið. Men sum rímiligt er, ein kundi av røttum hugsað sær, at við tí politisku linju, hesin flokkur hevur ført seinasta valskeiðið, so átti Fólkatingið at verið seinasta staðið, teir fóru at bøna og biðja veljaran velja seg í. Men hvat - eitt er orð, annað er veruleikin.

So har var einki nýtt undir sólini.

Men tað sum eg mest av øllum beit merkið í, var at Høgni Hoydal legði fyri við at bera lygnina fram. Hann segði nevniliga í útvarpinum týsdagin (beinleiðis citat): "Allir aðrir flokkar fara inn í danskan partapolitikk". Hetta er ósatt, og Høgni Hoydal veit tað fullvæl, men er longu nú vorðin so drivin í hesum, at hann ikki longur sansar, at boðskapurin ikki er sannur. Skjótt gekk.

Jóannes Eidesgaard var valdur við tí greiða boðskapi, at eg ikki fór at verða partur av donskum partapolitikki. Eg fór ikki, sum mínir undangongumenn í Javnaðarflokkinum áður høvdu gjørt, at innlima meg í tingbólkin hjá danska Javnaðarflokkinum. Hetta lyftið er hildið fram til denna dag. Eg havi ongantíð so frægt sum verið inni á gólvinum hjá tingbólkinum hjá javnaðarmonnum á Christiansborg. Eg veit ikki so frægt, hvar teir halda til.

Valkvøldið í marts 1998 stóð á jøvnum millum teir borgarligu og stjórnina hjá Nyrup. 89-89. Við tí seinasta mandatinum, tí nr. 90, boðaði eg frá, at eg ikki fór at fella eina danska javnaðarstjórn, og tískil fekk hon ikki ein meiriluta ímóti sær og kundi halda áfram. Hennara parlamentariska grundarlag var 89, og parlamentariska grundarlagið hjá teimum borgarligu var 89.

Og um onkur kanska skuldi havt gloymt tað, so var tað júst mín uttanveltaða støða, sum gjørdi, at Birthe Weiss ikki gjørdist formaður fyri Fólkatingið. Atkvøðugreiðslan stóð á jøvnum 89- 89, og bert ein atkvøða út av 179 valdi ikki at atkvøða, nevniliga mín. Tískil mátti teir fyri fyrstu ferð í søguni kasta lut um, hvør skuldi verða formaður.

At enda, so veit Høgni Hoydal eisini fullvæl, at tá mítt navn stendur á talvunum aftan fyri røðarapallin, so stendur FÆR aftan fyri navnið, og merkir tað Færøerne. Hjá øllum øðrum stendur floksheitið eitt nú S fyri Socialdemokratiet, V fyri Vinstra o. s. fr. Hjá Óla Breckmann stendur K, ið merkir Koservativ Folkeparti.

Sjálvandi haldi eg eisini, at tað er rætt, at eitt fólkatingsumboð fyri Tjóðveldisflokkin verður uttanfyri danskan partapolitikk, og uttan iva verður tað lættari hjá tykkum, tí nú hava danir vant seg til hesa støðuna, ta tíð eg havi verið á Christiansborg.

So segði Høgni Hoydal í somu tíðindasending, at hann fór møguliga at stuðla einari danskari stjórn, um hon m.a. viðurkendi okkara sjálvsavgerðarrætt. Hesi boðini trúgvi eg, at báðir Rasmussennarnir verða glaðir fyri at hoyra, tí hesin sjálvsavgerðarrættur er longu staðfestur í samtyktina frá 10. mei 2001. Henda dag samtykti 91 atkvøður fyri og 11 ímóti, at tað er tað føroyska fólkið, sum ger av, hvussu ríkisrættarligu viðurskiftini verða millum Føroyar og Danmark. Hetta uttan mun til, um talan er um fullveldi ella framhaldandi samstarv í ríkisfelagsskapinum. Og júst her liggur sjálvsavgerðarrætturin.

At gera hetta til ein trupulleika er óseriøst.

# Lagnuvalið

**Jóhan Petur Johannesen**

Tað er lítið at ivast í at hetta fólkatingsvalið, verður eitt sera týðandi val fyri okkum føroyingar.

Vit hava tey seinastu árini uppliva, at viðurskiftini ímillum føroyskar og danskar politikar, hava ikki verið av teimum bestu. Tí vil eg koma við eini innarligari áheitan á allar føroyingar, ið vilja varðveita ríkisfelaskapin, um at fara á val hin 20. november og velja eitt sambandsumboð á fólkating, (og ikki "danating", sum summi siga, tí Føroyar og Grønland eru jú eisini umboðai á fólktingi).

Eitt sambandsumboð, hugsar um allar partar av ríkinum og ikki einans um okkum sjálvi. Vit ynskja at endurskapa tað góða stevið, sum einaferð var ímillum okkum Føroyingar og danir.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



## VIÐMERKINGAR

# Tjóðveldisflokkurin - røddin hjá føroyska fólkinum

**Høgni Hoydal**
*Formaður í Tjóðveldisflokkinum.*



Tjóðveldisflokkurin hevur gjørt av, at stilla upp til fólkatingsval við hesi valskrá í níggju punktum.

**1. Eina frælsa, føroyska rødd á fólkating.**
- Tjóðveldisumboð leggja seg ikki út í donsk innanhýsis mál, og lata seg ikki nýta sum finnur í innanhýsis donskum partapolitikki.
- Tjóðveldisumboð telva sjálv og brúka bert sína ávirkan, tá tað snýr seg um at vinna føroysku tjóðini síni sjálvsøgdu rættindi og virðing.
- Umboð úr øðrum flokkum kunnu ikki skapa hesa virðing. Eitt umboð, sum hvørvur í donskum partapolitikki, kann aldri gerast ein virðilig, fræls, føroysk rødd.

**2. Trygdin fyri fullveldisætlanini**
- Tjóðveldisumboð eru trygdin fyri at fullveldisætlanin vinnur á mál gjøgnum sakliga upplýsing og støðufesti.
- Tjóðveldisflokkurin er trygdin fyri, at føroysk umboð í donskum flokkum ikki lima okkum inn í danska ríkið og selja sjálvsavgerðarrætt føroyinga í politiskum rossahandlum
- Eitt virðiligt farvæl til heimastýrið - vit bjóða javnbjóðis samstarvi vælkomnum
- Tjóðveldisumboðini vilja við sakligari upplýsing siga eitt virðiligt farvæl við heimastýri
- Tjóðveldisumboðini vilja treystliga sannføra danir um, at einasta virðiliga loysn millum londini, eru einar sjálvstøðugar Føroyar, har vit taka fulla ábyrgd av egnum landi. Og at Føroyar og Danmark síðani samstarva sum javnbjóðis brøðratjóðir og sjálvstøðug lond.

**4. Ein pallur til sjálvsvirðing og viðurkenning**
- Umboð Tjóðveldisflokssins vilja brúka fólkatingið sum ein pall, har føroyska fullveldisstríðið vinnur sær fatan og virðing - bæði í Danmark og úti í heimi.
- Vit vilja umboða allan tann føroyska sjálvstýrisvongin á virðiligan hátt.
- Vit vilja fáa í lag samrøðu, semju og samstarv við danskar politikarar. Vit vilja skapa meiri vitan, betri fatan, størri álit og størri virðing millum føroyingar og danir.

**5. Sjálvavgerðarrætturin staðfestast**
Tjóðveldisflokkurin vil stríðast fyri, at danskir myndugleikar viðurkenna føroysku tjóðina og sjálvsavgerðarrætt føroyinga.
- Tjóðveldisflokkuri vil mótmæla, at danska stjórnin nokta føroyskum myndugleikum at venda sær til altjóða samfelagið

**6. Føroyska málið viðurkennast**
- Tjóðveldisflokkurin vil mótmæla, at danir lýsa føroyskt sum eitt minnilutamál
- Tjóðveldisflokkurin vil krevja, at føroyskt verður viðurkent sum tjóðarmál føroyinga í altjóða samfelagnum

**7. Ognarrætturin til undirgrundina vinnast**
Tjóðveldisflokkurin vil berjast fyri at staðfesta ognarrætt føroyinga til undirgrundina sambært fólkarættinum

**8. Búskaparligu viðurskiftini á borðið**
- Tjóðveldisumboðini vilja stremba eftir at fáa saklig og verulig tøl fram um búskaparligu viðurskiftini millum Føroyar og Danmark
- Tjóðveldisumboðini vilja vísa á, at trygdin fyri vælferð í Føroyum eru ikki danskir pengar, men einar sjálvberandi og samhaldsfastar Føroyar
- Rættindi føroyinga í Danmark verjast
- Tjóðveldisumboðini vilja mótmæla, at danska stjórnin setti føroyingar í Danmark inn í eitt roknistykki, har teir vórðu skírdir útreiðsla hjá danska skattgjaldaranum
- Tjóðveldisflokkurin vil virka fyri rættindunum hjá føroyingum í Danmark sum ein tjóðskaparligur minniluti. Fortreytin fyri hesum er, at føroyska tjóðin og okkara egna land verður viðurkent.

Hjá Tjóðveldisflokkinum er greið tala!

Vit vilja vera ein fræls, føroysk rødd á fólkatingi!

Føroyingar kunnu velja millum undirbrotligheit ella sjálvsvirðing.

Við at velja Tjóðveldisflokkin velja vit sjálvsvirðingina!

Tjóðveldisflokkurin er røddin hjá føroysku tjóðini!

# Onki dupultspæl - bara greið tala

**Jógvan Arge**
*Valevni tjóðveldisfloksins til fólkatingsvalið*



Føroyingar eiga at taka seg úr fólkatinginum, tá teir hava fingið egna grundlóg og fult vald á egnum landi. Men so leingi yvirvaldið liggur í Keypmannahavn, eiga føroysk umboð at vera røddirnar, ið á virðiligan hátt umboða føroyska fullveldisynskið.

Føroyskar røddir skulu tala greitt á fólkatingi fyri sjálvsagda ynskinum um fult sjálvst ri. Tær skulu ikki tagna, tá á stendur, og tær skulu ikki tiga, tí tær eru heftar at donskum flokkum. Tær skulu vera sannar og trúgvar ímóti tí fólki og teirri sak, tær umboða. Ongantíð víkja og ongantíð svíkja.

Samstundis skulu tær vísa virðing fyri mótpartinum og fremja forstáilsi vítt og breitt fyri føroyska fullveldisynskinum. Áhaldandi samanbrestir fremja onga sak. Men upprættir fólkatingsmenn, sum við stoltleika standa við sítt, kunnu sjálvt fáir í tali gera avgerandi munin.

Ov fáir fólkatingsmenn hava seinastu 150 árini talað Føroya sak á fullgóðan hátt og ongir seinastu árini. Men nú Føroyar flyta seg ímóti fullum sjálvstýri, hevur fólkatingið brúk fyri at hoyra greiða føroyska talu, og flokspolitiska dupultspælið má halda uppat.

Siðiligar røddir við søguligari barlast gera munin í hesum tíðum. Nú er ikki stundin at lata seg niðurbinda í donskum innanríkispolitikki. Nú er ikki stundin at fara upp í liðið hjá mótpartinum. Nú er at siga tað, sum er sjálvsagt í einum og hvørjum føroyskum hjarta.

At Føroyar eiga at gerast sjálvstøðugar. At tað er sjálvsagt, at ein tjóð vil ráða sær sjálvari. At tað er sjálvsagt, at Føroyar og Danmark í framtíðini samstarva á jøvnum føti. At tað er sjálvsagt, at eitt land, sum hevur gjørt annað land heft av sínum pengum, virkar fyri at gera tað óheft aftur.

Fólkarættarligir serfrøðingar siga, at hetta er eitt sjálvsagt krav hjá øllum hjálondum, og hesin boðskapur er ikki fløktur. Men undanfarin umboð á fólkatingi hava ikki viljað borið hann greitt fram. Tí er umráðandi at velja rætt hesaferð. Og Tjóðveldisflokkurin talar greitt. Hann víkir ikki.

# Konfrontatiónin steðgast! Breið semja finnast!

**Jan Johannesen**

Á fjalli er umráðandi at fjallmenn reka í felag. Soleiðis er eisini, um ein breið semja skal finnast í politikki. Sambandsflokkurin virkar fyri, at føroyingar finna saman um eina breiða semja í ríkisfelagsskapinum.

Núsitandi samgongu legði hart út við sínari fullveldisætlan. Alt skuldi vera so væl fyrireiðka. Breið semja skuldi finnast, søgdu løgmaður og varaløgmaður. Men hetta varð í veruleikanum bert innantóm orð. Innpakkingarpappírið sá vakurt út, men tíverri varð pakkin við navnaspjaldrinum "breið semja" bert ein tóm tunna innan. Og tær buldra sum kunnugt sera illa.

**Umráðandi at finna saman**
Tá ið eg plaga at vera á fjalli í heimbygdini Miðvági, er umráðandi, at fjallmenninir norðanfyri og teir heimanfyri reka í felag. Hetta fyri at savna eina stóra gongu og síðani reka hana í rætt uttan at sleppa ov nógvum seyði. Verður ov hart rikið, ja, so leypur gongan á mannin á urias posti. Tá er ikki so stuttligt at vera fyri. Skal fjallgongan eydnast væl, er neyðugt at fjallmenninir á báðum síðum nærkast hvørjum øðrum.

Soleiðis er eisini, um ein breið semja skal finnast á ríkisrættarliga økinum. Landsstýri hevur fingið fleiri ábendingar frá føroya fólkið um, at tað er tann breiða semjan innanfyri ríkisfelagsskapin sum fólkið vil hava. Palliba og Marsanna standa í dag á urias posti, eftir at samgongan hevur snýkt seg uttanum fólkaviljan.

**Veljarin kann steðga fullveldisætlanini**
Fullveldisætlanin er á fullari ferð ímóti "the point of no return." Í fyrsta umfarið, hvat viðvíkur blokkstuðlinum. Varðveitir núsitandi samgonga meirilutan eftir komandi løgtingsval, so heldur 4 ára skiftistíðin fram eftir valið. Skiftistíðin byrjar 1. januar.

Men veljarin kann enn steðga hesi fullveldisætlan. Byrjast kann tann 20. november. Skal ein breið semja finnast, so er umráðandi at fólkatingslimirnir vera talsmenn fyri einari slíkari ætlan. At teir kunnu vera lobbyistar millum danskar politikkarar, soleiðis at ein góð og breið skipan kann finnast. Ein skipan sum savnar og ikki spjaður.

Semjan kann fáast í lag við at Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin sleppa Tjóðveldisflokkinum uppá fjall, og finna saman við andstøðuni um eina felags loysn. Eina loysn, har spurningurin um loysing verður tikin av skránni. Tann spurningin kunnu teir taka uppaftur eina aðruferð, um teir hava hug til tað. Tað sum hesir flokkar saman við flestu føroyingum fáa burtur úr einari tílíkari loysn er:
- at fólkið verður savnað
- at ein rúmligari skipan í ríkisfelagsskapinum kemur ístaðin fyri heimastýrislógina
- at ein fýra skiftistíð verður tikin av borðinum
- at einstaki føroyingurin fær størri búskaparligan tryggleika

Palliba og Marsanna! Sambandsflokkurin hevur framlagt eina greiða valskrá uppundir fólkatingsvalið. Flokkurin ynskir m.a. nýskipan í ríkisfelagsskapinum, so at ógreiðar fløkjur verða greiddar, ríkisborgararætturin varðveittur, rættartrygdin varðveitt og betri samstarv fingið í lag í felagsmálum. Valið er títt!